# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Haldbetri støði undir sáttmála

Tað er einki óvanligt, at partar av fiskivinnuni eru misnøgdir við ein fiskiveiðisáttmála. Soleiðis hevur ofta verið – serstakliga í teirri tíðini, tá fjarleiðirnar høvdu nógv størri týdning. Bylgjurnar gingu mangan høgt og politikkarar brúktu mangan nógva orku til at royna at sissa partarnar. Soleiðis sæð er einki nýtt í tí misnøgd, sum nú kemur fyri dagin í sambandi við sáttmálan við Rusland, sum skal galda fyri 2009.

Hinvegin má ásannast, at atfinningarnar móti Fiskimálaráðnum í sambandi við nevnda sáttmála við Rusland eru óvanliga hvassar og óvanliga ítøkiligar. Sagt verður, at her vendur alt skeivan veg. Sáttmálin verður skýrdur at vera er ein katastrofa, og avarðandi vinnulívsmenn eru skelkaðir. Teir halda, at tíðin er komin at taka eina uppgerð við russar, har kvotuvirðið landanna millum verður regulerað, nú heildarkvotan av svartkjafti er so nógv skorin. Lutfallið eigur at broytast, siga umboðini fyri nótaflotan og funnist verður at Fiskimálaráðnum fyri ikki at hava nýtt júst hetta høvið at taka uppgerðina við Rusland. Hesin parturin umboðandi nótaflotan ger vart við, at samráðingar um fiskiveiðikvotur í sínari tíð vóru grundaðar á toskavirði. Ført verður fram, at virðið á ymisku fiskasløgunum er so nógv broytt síðan fyrsta fiskirættindarsáttmálan við Rusland og víst verður soleiðis á, at fortreytirnar sostatt eru so nógv broyttar, at øll skipanin eigur at verða endurskoðað.

Sum longu nevnt hevur mangan leikað á eftir fiskiveiðisáttmálar við onnur lond ella við ES samveldi, men bylgjurnar hava altíð lagt seg sum fráleið. Hinvegin tykist støðan hesuferð at vera grundleggjandi øðrvísi enn undanfarin ár. Atfinningarnar eru heilt óvanliga hvassar og koma frá so nógvum ymsum síðum, sum annars ikki áður hava lagt seg út í hesi viðurskifti. Eisini á politisku síðuni er órógv og tingmenn fýlast á, at sáttmálin ikki hevur verið fyri í uttanlandanevndini og harmast um, at hetta stóra mál er avgreitt uttanum løgtingið.

Hóast eingin beinleiðis politiskur vandi tyksist vera fyri fiskimálaráðharran, so má handfaringin av hesum máli geva samgonguni og serstakliga løgmanni nakað at hugsa um. Fiskimálaráðharrin er komin í tupulleikar av hesum máli, sum ikki ser so løgið, tí í hesum máli bresta sera stór búskaparlig áhugamál saman. Her eru nógvir ósvarðaðir spurningar, og her er torført at vita, hvørjum ein skal trúgva. Sáttmálin er farin fyri komandi ár, men fiskimálaráðharrin kann ikki lata samráðingarnar fyri 2010 fara fram undir líknandi umstøðum. Hann má taka stig til eina óhefta meting av allari sáttmálaskipanini, soleiðis at komandi samráðingar byggja á eitt sakliga og fakliga haldgott støði sum gjørligt. Tað verður neyvan full semja millum vinnulívsmenn um eitt so trupult mál, men er støðið undir slíkum sáttmála fakliga forsvarligt, so eiga vit at kunna rokna við at ein komandi sáttmáli við Rusland eisini er politiskt og búskaparliga forsvarligur.

**Sosialurin**

## Vit hava ikki stundir at bíða

HELENA DAM Á NEYSTABØ
landsstýriskvinna í skúlamálum



Fyrsta úrslitið av landsroyndunum er nú kunngjørt, og næmingar, lærarar og skúlaleiðslur hava fingið nøkur heilt ítøkilig úrslit at arbeiða við í lærugreinunum føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni.

Næmingurin sær júst, hvørja uppgávu hon ella hann megnaði og ikki megnaði, og kann tí saman við lærara og foreldrum meta um, hví so var. Kanska hevði flokkurin arbeitt serliga nógv við júst tí, sum spurt var um, og tí var førleikin fingin. Møguliga var førleikin ikki fingin, tí at flokkurin ikki hevði arbeitt við tí undan landsroyndini – og tað kunnu vera so ómetaliga nógvar aðrar grundir til, at úrslitið var, sum tað var. Avgerandi er, at hvør einstakur og eisini foreldrini geva sær stundir til at arbeiða við úrslitunum í stórum álvara.

Eisini Mentamálaráðið og eg sjálv sum landsstýriskvinna í mentamálum hava fingið eitt álvarsmál á borðið at eftirmeta. Sjálvsagt vildu vit ynskt, at landsmiðaltalið var betri. Hin vegin eri eg sannførd um, at júst tað, at úrslitini áttu at verið nógv betri, kemur at gagna sakini, um vit ansa eftir ikki at peika onkran einstakan syndabukk út.

Mín niðurstøða er í fyrstu atløgu, at ein miðvís íløga skal gerast í at eftirútbúgva lærarar til byrjanarundirvísing. Vit vita, at børn læra á so ymiskan hátt, summi gjøgnum eygað, onnur gjøgnum oyrað, og uppaftur fleiri frábrigdi eru. At lofta hesari avbjóðing krevur førleika, útbúgving og amboð, og tí mugu hesi trý setast á dagsskrá beinanvegin.

Tað er prógvað og staðfest, at er tann grundleggjandi lesi- og rokniførleikin ikki fingin í fjórða flokki, ella helst fyrr, so er trupult at bøta um hetta seinni. Hóast tað kann vera trupult at fáa neyðugar játtanir til endamálið í hesum døgum, so skulu vit finna loysnir, sum bøta um førleika, eftirútbúgving og undirvísingarmiðlar.

Í øðrum lagi er mín niðurstøða, at vit í uppaftur størri mun mugu fáa foreldrini á banan. Fáa foreldrini at spæla ein virknan leiklut í arbeiði skúlans at skapa eitt trygt og livandi skúlaumhvørvi, arbeiðsfrið og trivnað, og til tess at fyribyrgja tí ráki, ið sæst í kanningini, at motivatiónin at læra minkar, eldri børnini vera. Til tess er neyðugt at fáa tey nývaldu skúlastýrini at virka væl.

Alt hetta kemur ikki av sær sjálvum og er ein týdningarmikil avbjóðing. Ætli longu fyrst í komandi ári at bjóða øllum teimum nývaldu skúlastýrunum til eina ráðstevnu, at lurta eftir teimum og at svara spurningum, og har vit í felag seta eina kós út í kortið, ið er tann besta fyri okkara børn og okkara fólkaskúla.

Sæð í hesum ljósi eiga vit at fegnast um bæði landsroyndina og um skúlastýrisvalið.

Um tað er rætt, at fjórði hvør næmingur hevur ein grundleggjandi trupulleika at lesa og at rokna, so hava vit ikki stundir til at bíða.

## Deyðans vatn - 2

SVENNING AV LOFTI



Fyri fáum vikum síðani fingu vit at vita at brennivínshúsið Dism, var komið við nýggjum rúsløgi, sum framleiðararnir geva heitið Lívsins Vatn. Tá vísti eg á, "at mong hvøkku við og mettu tað, sum spottan av ringum slagi tá ið hesi tíðindi spurdust í útvarpinum," og peikaði á tað høpisleysa í at geva brennivíni hetta navnið, samstundis sum eg grundgav fyri áskoðan míni.

Nakað eftir sást ein frágreiðing í bløðunum frá persóni, ið hevði við hetta virkið at gera. Hann segði seg vera harman um at fólk vóru særd av, at teir høvdu givið hesum brennivínsdrykki navnið "Lívisins vatn," men royndi samstundis at verja avgerð teirra um at nevna drykkin "Lívsins vatn".

Men tað má vera teimum greitt, sum hava givið hesum drykki slíkt navn, at tað særir flestu føroyingar djúpt, tí meginparturin føroyingar virða Bíbliuna, sum fleiri ferðir nevnir lívsins vatn, ið frelsarin einans kann geva menniskjum. Tí er navnið eitt heilagt heiti, ið ikki eigurt at verða nýtt á slíkan hátt. Um teir ikki vistu hetta áður, so vita eigararnir tað nú.

Eingin skilagóð verja er í at nýta eitt slíkt navn. Í besta føri er eitt slíkt navn ein følsk reklama, ið villeiðir brúkaran. Hetta vita øll, ið hava kent sviðan av brennivínsavleiðingunum. Eitt er at spotta av óvart. Men at spotta við vitandi og vilja er lítið sømiligt – og álvarsligt. Nøkur skriftorð í Opinberingini, har lívsins vatn verður umrøtt:

"Tí Lambið, sum er mitt fyri hásætinum, skal verða hirði teirra og leiða tey til *vatnskeldur lívins*, og Gud skal turka hvørt tár av eygum teirra." Op. 7,17

"Eg skal geva hinum tysta av *keldu lívsvatnsins*." Op. 21,06

"Hann vísti mær *lívsvatnsánna* skínandi sum krystal, hon rann út frá hásæti Guds og Lambsins." Op. 21,01

"Andin og brúðurin siga : "Kom!" Tann, ið hoyrir, sigi: "Kom!" Tann, ið tystir, komi! Tann, ið vil, taki *vatn lívsins* fyri einki!" Op. 22,17.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.